Kopargøta 1
FO-100 Tórshavn

+298 30 40 50
www.ahr.fo

SKJAL A2

Fra: Sosialráðgevarafelagið Føroya <srfelag@gmail.com>
Sendt: hósdagur, 19. februar 2026 18:40
Til: Jákup Andrias Kristiansen <jakupA@ahr.fo>
Cc: Hallbjørg Lamhauge <HallbjorgL@av.fo>; Kristin Nolsøe Bech <knbech@gmail.com>; Karin Reginsdóttir Joensen <karinrjoensen@hotmail.com>
Emne: Re: Viðmerkingar

Góði Jákup,

Vísandi til omanfyrinevndu teldupost, sum er sent til tín 11. desember 2025, sendi Sosialráðgevarafelagið viðmerkingar frá felagnum til lógaruppskotið um bráðfeingis bústaðir og serreglur á almannaøkinum fyri burturriknar ukrainar.
Vit síggja at lógaruppskotið verður sett á skrá til 1. viðgerð í Løgtinginum tann 24. februar 2026, og undrar tað okkum almikið at vit ikki síggja okkara ummæli/viðmerkingar undir skjølunum, sum eru upplýst ísv. uppskotinum (sí her: https://www.logting.fo/mal/mal/?id=11486)
Er møguligt at fáa eina frágreiðing um hetta?

Við vón um skjótt svar,
Nevndin í Sosialráðgevarafelagnum

Den tors. 11. dec. 2025 kl. 21.54 skrev Sosialráðgevarafelagið Føroya <srfelag@gmail.com>:

Hey
Viðheft eru viðmerkingar til lógaruppskot um bráðfeingis bústaðir og serreglur á almannaøkinum fyri burturriknar ukrainar.

Vinaliga
Sosialráðgevarafelag Føroya

Hallbjørg Lamhauge

Forkvinna

Óluva Nolsøe Djurhuus

Fra:	Jákup Andrias Kristiansen
Sendt:	hósdagur, 19. februar 2026 20:28
Til:	Sosialráðgevarafelagið Føroya
Cc:	Bjørgfríð Ludvig; Astrid Reinert Øregaard
Emne:	SV: Viðmerkingar
Vedhæftede filer:	Til ummælis: Uppskot til løgtingslóg um bráðfeingis bústaðir og serreglur á almannaøkinum fyri burturriknar ukrainar

Góða Hallbjørg

Fyrst og fremst takki eg fyri viðmerkingarnar.

Orsøkin til, at ummælið frá Sosialráðgevarafelagnum ikki er sent løgtinginum, og ikki er tikið við í ummælisviðgerðina, er, at ummælið bara varð sent beinleiðis til mín, og ikki til høvuðsteldupostadressuna hjá (táverandi) Almanna- og mentamálaráðnum, sum ummælispartarnir fingu boð um í teldupostinum frá 21. november 2025, sí viðfesta teldupost.

Hetta hevur tíverri havt við sær, at ummælið ikki varð skrásett í málið, og tí er tað farið afturvið borðinum hjá mær. Tað harmar meg sjálvandi.

Viðvíkjandi tykkara viðmerking til § 10 skal eg nevna, at 1. mars 2026 yvirtekur Almannaverkið uppgávuna sum sosialur samskipari í bráðfeingis bústøðunum, og at sosiali samskiparin eftir hetta væntandi fer at hava útbúgving sum sosialráðgevi.

Viðvíkjandi tykkara viðmerking til kunngerðarheimildina í § 11, nr. 3, sum gevur landsstýrisfólkinum í almannamálum møguleika til – fyri burturriknar ukrainar – at víkja frá regluni um, at sambúgvandi fáa eina lægri uppihaldsveiting enn einsamøll, eru vit tilvitað um, at burturriknu ukrainarnir við hesum høvdu fingið betri sømdir enn føroyingar. Mett verður tó, at burturriknu ukrainarnir uppá nógvar mátar eru nógv verri fyri enn føroyingar, tí teir hava so at siga einki netverk í Føroyum. Tí er hendan kunngerðarheimildin sett inn í lógaruppskotið saman við hinum heimildunum.

Eg skal annars nevna, at eitt par í pensjónsaldri, sum hevur so lítið eftir at liva fyri, tá húsaleigan er goldin, sannlíkt lýkur treytirnar fyri at sleppa inn í ein bráðfeingis bústað, tí tá er bústaðurin ikki hóskandi fyri tey.

Eg skal boða Løgtinginum frá, at ummælið hjá tykkum er farið afturvið borðinum hjá mær, so tit fáa møguleika at bera tykkara sjónarmið fram í sambandi við nevndarviðgerðina.

Jákup Andrias Kristiansen
Fulltrúi / Head of Section

Office: +298 30 40 50
Mobile: +298 25 70 13
jakupa@ahr.fo

ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Social Affairs and Health

Almanna- og heilsumálaráðið